# *Bygdaráðsfundur*

**<u> Bygdaráðsfundur 27.09.2021 kl. 18.00</u>**

Fundarstað: Fundarhøli

| | | |
|---|---|---|
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**<u>Til viðgerðar:</u>**

Mál nr. 121/2021 Umsókn um byggiloyvi til sethús matr. nr. 357d – Gunnar Á. Højgaard - **ALMENT**
Mál nr. 122/2021 Umsókn um graviloyvi matr. nr. 267 l – Elsa og Pætur Steinhólm - **ALMENT**
Mál nr. 123/2021 Umsókn um byggiloyvi til sethús matr. nr. 267p - Bojan Elek og Beinta Midjord - **ALMENT**
Mál nr. 124/2021 Umsókn um marknaumskipan – Eigil Andersen - **ALMENT**
Mál nr. 125/2021 Umsókn um byggiloyvi til altan og ger av parkeringsøki – Joan Mikkelsen **- ALMENT**
Mál nr. 126/2021 Umsókn um graviloyvi – Oda Højgaard og Bergur Midjord **- ALMENT**
Mál nr. 127/2021 Ásetan av fíggjarkarmi fyri 2022 hjá Nes kommunu - **ALMENT**
Mál nr. 128/2021 Broyting av láni frá BankNordik 08.01.20219 – Nes kommuna – A**LMENT**
Mál nr. 129/2021 **AFTURLATIÐ**
Mál nr. 130/2021 **AFTURLATIÐ**
Mál nr. 131/2021 **AFTURLATIÐ**

**<u>Mál nr. 121/2021 Umsókn um byggiloyvi til sethús matr. nr. 357d – Gunnar Á. Højgaard -</u> ALMENT**
**<u>J.nr. 1205-1-2021</u>**

Í umsókn, móttikin 30.08.2021, søkir Gunnar Á. Højgaard um byggiloyvi til sethús í tveimum hæddum eins og bilhús á matr. nr. 357d, ið er við Hjallaveg.

Søkt verður um loyvi sambært innsendu tekningum.

> **Á fundi 15.09.2021 mælir Tekniska nevnd til at geva byggiloyvi til sethús á matr. nr. 357d, sambært innsendu tekningum, og at grannasáttmáli fyriliggur við grannan sunnanfyri.**
>
> **Tilmælið frá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

# *Bygdaráðsfundur*

**Mál nr. 122/2021 Umsókn um graviloyvi matr. nr. 267 l – Elsa og Pætur Steinhólm - ALMENT**
**J.nr. 234-16-2019**

Í umsókn 23/082021 søkja Elsa og Pætur Steinhólm um graviloyvi matr. nr. 267L, við Høganesvegin.

Søkt verður sambært innsendu tekningum.

> **Á fundi 15.09.2021 mælir Tekniska nevnd til at geva graviloyvi sambært innsendu tekningum.**
>
> **Tilmælið frá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 123/2021 Umsókn um byggiloyvi til sethús matr. nr. 267p– Bojan Elek og Beinta Midjord**
**J.nr. 234022-12-2019**

Í umsókn 26.08.2021 søkja Bojan Elek og Beinta Midjord um byggiloyvi til sethús í tveimum hæddum, á matr. nr. 267p við Høganesvegin.

Søkt verður um loyvi sambært innsendum tekningum.

> **Á fundi 15.09.2021 mælir Tekniska nevnd til at geva byggiloyvi til sethús á matr. nr. 267p, sambært innsendu tekningum.**
>
> **Á fundi 15.09.2021 mælir Tekniska nevnd til at geva graviloyvi sambært innsendu tekningum.**
>
> **Tilmælið frá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 124/2021 Umsókn um marknaumskipan – Eigil Andersen - ALMENT**
**J.nr. 1205-10-2021**

Í umsókn, dagfest 25.08.21, verður søkt um marknaumskipan. Eigil Andersen ynskir at rætta upp markalinjuna við grannan. Talan er um tvær ognir. Hetta kann gerast við at 699r letur uml. 3 fermetrar til matr. nr. 699q, og 699q letur uml. 3 fermetrar. til matr. nr. 699r. Somuleiðis verður søkt um at fáa sett markini av nýggjum.

> Á **fundi 15.09.2021 mælir Tekniska nevnd til at játta marknaumskipan hjá Eigil Andersen.**
>
> **Tilmælið frá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

# *Bygdaráðsfundur*

**Mál nr. 125/2021 Umsókn um byggiloyvi til altan og ger av parkeringsøki – Joan Mikkelsen - ALMENT J.nr. 1201-25-2021**

Í umsókn, dagfest 01.09.2021, søkir Joan Mikkelsen um byggiloyvi til altan og ger av parkeringsøki á matr. nr. 676, Nes

Søkt verður um loyvi sambært innsendum tekningum

**Á fundi 15.09.2021 mælir Tekniska nevnd til at geva byggiloyvi samb. tekning treytað av, at parkeringsviðurskiftini verða avgreidd fyrst.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 126/2021 Umsókn um graviloyvi – Oda Højgaard og Bergur Midjord - ALMENT J.nr. 234022-11-2019**

Í umsókn, dagfest 27.08.2021, søkja Oda Højgaard og Bergur Midjord um graviloyvi matr. nr. 267i við Høganesvegin.

Søkt verður sambært innsendum tekningum.

**Á fundi 15.09.2021 mælir Tekniska nevnd til at geva graviloyvi sambært innsendum tekningum.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 127/2021 Ásetan av fíggjarkarmi fyri 2022 hjá Nes kommunu - ALMENT J.nr.32102-2-2020 – 1107-8-2021**
Ásetan av fíggjarkarmi fyri 2022 – 1. Viðgerð

**Fíggjarnevndin mælir til at áseta fíggjarkarmin fyri 2022 soleiðis:**

| | **2022** | **2021 v/eykaj.** | **Munur** |
|---|---|---|---|
| §20 Kommunuskattur | tkr. 54.000 | tkr. 51.000 | tkr. 3.000 |
| §20 Húsaleiguskattur | tkr. 5 | tkr. 10 | tkr. -5 |
| §20 Felagsskattur | tkr. 1.000 | tkr. 1.000 | tkr. 0 |
| §20 Eftirlønargjøld | tkr. 10.425 | tkr. 9.311 | tkr. 1.114 |
| §20 Dis, Fas v.m. | tkr. 2.867 | tkr. 3.038 | tkr. -171 |
| **Inntøkur í alt** | **tkr. 68.297** | **tkr. 64.359** | **tkr. 3.938** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| §1 Kommunal Fyrisiting | tkr. 5.125 | tkr. 5.057 | tkr. 68 |
| §2 Almanna- og heilsumál | tkr. 20.744 | tkr. 19.437 | tkr. 1.307 |
| §3 Børn og ung | tkr. 13.856 | tkr. 13.583 | tkr. 273 |
| §4 Undirvísing | tkr. 4.224 | tkr. 4.366 | tkr. -142 |
| §5 Mentan og frítíð | tkr. 4.242 | tkr. 4.660 | tkr. -418 |
| §6 Teknisk mál | tkr. 4.778 | tkr. 4.774 | tkr. 4 |
| §7 Kommunal virki | tkr. 3.826 | tkr. 3.694 | tkr. 132 |
| **Rakstur í alt** | **tkr. 56.795** | **tkr. 55.571** | **tkr. 1.224** |
| | | | |
| **Úrslit áðrenn fíggjarkostnað** | **tkr. 11.502** | **tkr. 8.788** | **tkr. 2.714** |
| | | | |
| §20 Rentustuðul | tkr. 870 | tkr. 770 | tkr. 100 |
| §20 Rentuútreiðslur | tkr. 443 | tkr. 481 | tkr. -38 |
| **Fíggjarkostnaður í alt** | **tkr. 1.313** | **tkr. 1.251** | **tkr. 62** |
| | | | |
| **Úrslit áðrenn avdrøg og íløgur** | **tkr. 10.189** | **tkr. 7.537** | **tkr. 2.652** |

**Á fundi 21.09.2021 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við ásetta fíggjarkarminum fyri 2022.**

**Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 128/2021 Broyting av láni frá BankNordik 08.01.20219 – Nes kommuna - ALMENT J.nr. 34002-1-2019**

Nes kommuna hevur tvey lán, eitt við fastari rentu, og eitt við broytiligari rentu. Lánið við fastari rentu verður útgoldið í 2026.

Lánið við broytiligari rentu skuldi verið byrja uppá at niðurgjalda 31.12.2020, men varð hetta útsett til 31.03.2022.

**Á fundi 21.09.2021 mælir Fíggjarnevndin til at útseta niðurgjalding av láninum, við broytiligari rentu, til 01. jan. 2027.**

**Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**